GÍ-Skála 3-1 (2-0):

# Nú vendi alt øðrvísi

**Gøtumenn skoraðu beinanvegin tvey mál, og Skála vann seg ongantíð eftir tann skelkin. Heldur ikki, tá ið gestirnir síðstu løtuna vóru yvirmannaðir eydnaðist teimum at koma afturíaftur**



*Gøtumenn løgdu hart fyri, tá Skála vitjaðu fyri aðru ferð í fimm dagar, og hesaferð eydnaðist vertunum at vera omaná*

LØGMANSSTEYPIÐ GI-SKÁLA

*Jóannes Hansen*

GÍ er botnlið í bestu deildini, og Skála, sum er á heiðursmerjaplássið, fór sunnudagin úr Gøtu við 3-2 sigri. Hósdagin segði GÍ takk fyri seinast. Teir vunnu 3-1 í fjórðingsfinaluni, og harvið var møguleikin fyri fyrstu hálvfinaluni nakrantíð fokin hjá skálamonnum.

Fyritreytirnar hjá GÍ vóru ikki batnaðar. Veteranurin á miðvøllinum, Sámal Joensen, var skaddur, og 17 ára gamli Sam Jacobsen loysti hann av. Men ungi maðurin megnaði saman við einum øðrum ungum manni, Símun Louis Jacobsen, at arbeiða so mikið hart og væl, at Skála miðvøllurin, sum fleiri ferðir áður hevur víst, at hann er rættuliga stinnur, ikki fekk tað yvirtakið, sum kundi bera sigur við sær.

- Eg eri ógvuliga fegin. Í undanfarnu uppgerðunum og aftur sunnudagin í landskappingini ímóti Skála gjørdu okkara menn persónlig mistøk, sum kostaðu sigurin. Hesa ferð vóru eingi persónlig mistøk, og so høvdu vit yvirskotið, sum skal til fyri at vinna. Vónandi fer hetta at síggjast aftur í landskappingardystunum, sigur GÍ venjarin Krzystof Popczynski.

Fyritreytirnar gjørdust beinanvegin øðrvísi, enn tær vóru í landskappingardystinum sunnudagin. Súni Olsen setti hol á við góðum frísparki, og vongverjin í vinstru, Hanus Jacobsen, sum gerst alt týdningarmiklari liður á GÍ liðnum, økti til 2-0, tá ið hann sendi fríspark úr høgru í málið. Skála málverjin átti at havt vart fyri í hvussu so er øðrum málinum.

So var talan um mótbrekku hjá Skála, sum ongantíð megnaði at fáa skjótt spæl við nógvum flytingum í lag. Ofta vórðu langar sendingar sparkaðar í GÍ brotsteigin, og tað kom væl við hjá stóru miðverjunum. At GÍ royndi at leggja press á frammarlaga á vøllinum tóktist ikki at koma væl við hjá Skála.

Tá ið 2. hálvleikur var eitt korter gamalur kom spenningur. Jónhard Frederiksberg smekkaði innfyri GÍ málið, har pólverski Robert var so óheppin at stýra bóltinum í málið aftanfyri landsmannin og liðfelagan í GÍ málinum.

Men GÍ megnaði at svara aftur. Eitt korter reið um snarið. So tók GÍ venjarin søkina í egnar hendur. Popczynski sneiddi seg leysan og legði upp til Poul Arna Jacobsen, sum var komin á vøllin beinanvegin eftir steðgin, og hann setti við høvdinum bóltin í netið til 3-1.

Tá ið so Hans Pauli Petersen varð sendur av vøllinum fyri seinna gula kortið, royndi Skála síðsta korterið at koma fyri seg aftur, men hugflogið var ikki, sum tað ofta hevur verið, og gøtumenn komu væl undan.

## FAKTA UM DYSTIN

**GÍ-Skála 3-1 (2-0)**
**Fjórðingsfinala**
**Dómari:** Petur Skarðenni
1-0: Súni Olsen 2.
2-0: Hanus Jacobsen 10.
2-1: sjálvmál Robert Rzeczycki 60.
3-1: Poul Arni Jacobsen 74.
**GÍ:** Marcel Dawid - Jónreid Dalheim, Atli Gregersen, Robert Rzeczycki, Hanus Jacobsen - Áslakur R. Petersen (Poul Arni Jacobsen, 46.), Sam Jacobsen, Símun Louis Jacobsen (Poul Henning Jacobsen, 78.) Súni Olsen, Hans Pauli Petersen - Krzystof Popczynski.
**Gult kort:** Hanus Jacobsen, Hans Pauli Petersen
Reytt kort: Hans Pauli Petersen (2 gul kort) 76.
**Skála:** Vlada Filipovic - Bárður Danielsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Iulian Florescu - Hanus Thorleifsson (Rói Jacobsen, 46.), Pauli G. Hansen, Nenad Stankovic, Pætur Dam Jacobsen - Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen (Sveinur Justinussen, 78.)
**Gult kort:** Pauli G. Hansen og Pætur Dam Jacobsen

---

Fram-B68 1-2 (1-0):

# Fram argaði á Toftum

**Men í seinna umfarinum megnaði favoritturin at gera málini, sum skuldu til fyri at gera partur av hálvfinaluni**

LØGMANSSTEYPIÐ

*Jóannes Hansen*

Fram var heimalið og B68 útilið á Toftum. Og í 1. hálvleiki tóktist tað sum um, at 3. deildarliðið Fram kendi seg heilt væl á Svangaskarði, har B68 ikki megnaði at liva upp til, at teir vóru favorittar.

Fram legði seg á odda í 31. minutti. Vongverjin í høgru hjá B68 royndi at leggja aftur til málverjan, men álopsspælarin hjá Fram, Hansmar Poulsen, sum er uppvaksin á Toftum og í B68, var skjótur at leggja seg ímillum og at senda bóltin framvið Alberti Sævarsyni. Harvið staðfesti Hansmar sína støðu sum toppskjútti í steypakappingini.

Eftir steðgin royndi B68 at taka seg saman. Men fyrst vóru teir orduliga kløkkaðir, tá ið teir noyddust at bjarga á strikuni. Útjavnandi málið skoraði Jóhan Petur Poulsen í 53. minutti, tá ið hann úr høgru sneiddi í brotsteigin og smekkaði til.

Julian Johnsson, sum í 1. hálvleiki hevði sent í stólpan, skoraði sigursmálið, tá ið ein tími var farn. Hann var leysur í brotsteiginum, tá ið hann skoraði.

Í 65. minutti misti Fram Áka Mortensen, sum fekk beinleiðis reytt kort, men tað tóktist kortini ikki at órógva Fram so nógv, at teir vóru undirmannaðir. B68 hevði bóltin mest síðsta hálva tíman, men teir megnaðu ikki at skora málið, sum skuldi til fyri at taka spenningin burtur, áðrenn dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð.

## FAKTA UM DYSTIN

**Fram-B68 1-2 (1-0)**
**Fjórðingsfinala**
**Dómari:** Oddmar Andreasen
1-0: Hansmar Poulsen 31.
1-1: Jóhan Petur Poulsen 53.
1-2: Julian Johnsson 60.
**Fram:** Henrik Juul - Rógvi Højgaard (Bergur Strøm, 50.), Rúni Juul, Tommy Jacobsen, Arnfinn Hansen, Mortan Joensen (Brandur Hansen, 67.), Bárður Mikkelsen (Fróði Baldvinsson, 75.), Sunleif Jacobsen, Hansmar Poulsen, Gunnar Haraldsen, Áki Mortensen
**Gult kort:** Áki Mortensen og Mortan Joensen
**Reytt kort:** Áki Mortensen 65. (beinleiðis reytt)
**B68:** Albert Sævarson - Jóhan Dávur Højgaard, Ovi Magnussen, Arnbjørn Danielsen, Øssur Hansen - Eyðstein Skipanes, Julian Johnsson, Bogi Petersen, Fabricio Borges (Óli Olsen, 80.)- Jóhan Petur Poulsen, Kristian Anton Andreassen
**Gult kort:** Øssur Hansen, Ovi Magnussen